# ÚTBÚGVINGAR UTTANLANDS

*Navn:*
Gurið Simonsen

*Hvagani ert tú:*
Úr Havn

*Hvar hevur tú lisið/lesur tú:*
Í Skotlandi

*Hvat hevur tú lisið/lesur tú:*
Tikið bachelor í psykologi á University of Aberdeen (4 ár). Taki nú doctorate i Counselling psykologi á Glasgow Caledonian University (3 ár)

*Hvussu kanst tú lýsa skúlan:*
Aberdeen universitet er traditionelt, inspirerandi og professionelt. Har er hugnaligt og vinarligt umhvørvið. Bæði lesandi og lærarar eru fyrikomandi og fryntlig - eins og flestu fólk i Skotlandi.

*Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið:*
Tað fyrsta árið av eini bachelor í Skotlandi kann tykjast yvirraskandi lætt. Hetta kemur helst av, at tey í Skotlandi eru rættuliga ung, tá tey fara á universitetið. Tí er tað skipað soleiðis, at ein ikki hevur ov nógv at gera, og at ein hevur møguleika at royna nógvar ymsar lærugreinar aðrenn man bindir seg til sítt høvuðsfak. Eg læs til dømis statistik og sociologi umfram psykologi. Av tí sama er hetta eitt gott ár hja okkum føroyingum at venja okkum at lesa og tosa enskt.
Tey næstu árini økist arbeiðsbyrðan nógv. Á øðrum ári eru eksamiur, ið gera av, um man sleppur inn til fjórða árið. Hetta er stressandi – men ger eisini, at tú allatíðina gert títt besta.
Aberdeen er ein rættur studentabýur. Tey flestu fara ofta a "pub" og ganga nógv í býnum – serliga tað fyrsta árið. Her er lív í og nógv at fara til.

**Fyrimunir og vansar av at lesa, har tú vart/ert:**
Ein stórur fyrimunur er, at tað er lættari at sleppa inn á universitet í Bretlandi enn til dømis í Danmark. Men um tú kemur inn til til dømis psykologi, so ert tú bert komin inn til bachelor og ikki til kandidat. Hetta mást tú søkja um, tá tú hevur tikið bachelorprógv. Á tann hátt er tað ikki lættari, tí kappingin er hørð at sleppa inn til bæði kandidat/masters (1 ár) ella doctorat/phd (3 ár).
Ein annar fyrimunur er, at tú ikki skalt gjalda skatt av tínum SU um tú lesur her.
Ein vansi av at lesa í Skotlandi er, at ferðasambandið millum Føroyar og Skotland er vánaligt.





*Navn:*
Rói Knudsen

*Hvagani ert tú?*
Eg eri úr Saltangará.

*Hvat lesur tú?*
Medisin (til lækna)

*Hvar lesur tú?*
Eg lesi í Stettin (Szczecin) í Póllandi. Tað er ein býur við umleið 400-500.000 fólkum. Býurin liggur tætt uppat týska markinum, og tað tekur umleið tveir tímar at koyra til Berlin

*Hvussu kanst tú lýsa skúlan?*
Skúlin eitur Pomeraninan Medical University. Tú kanst lesa medisin og til tannlækna her. Tað eru tvey ymisk program, eitt polskt program, har undirvísingin gongur fyri seg á polskum, og eitt enskt program, har undirvíst verður á enskum. Vit útlendsku eru sjávsagt í tí enska programminum.
Á tí enska programminum eru fólk frá mestsum allari verðini. Tó eru flest normenn og sviar.

*Hvussu kanst tú lýsa lestrarlívið?*
Hesin skúlin er ógvuliga gamaldags tá hugsað verður um undirvísingarhátt. Tað er skúlagongd hvønn dag, og tað er møtiskylda. Um tú hevur verið sjúkur og hevur læknaváttan, skalt tú taka tímarnar, tú hevur mist inn aftur eina ferð. Um tú ikki hevur læknaváttan, mást tú taka allar tímarnar inn aftur tríggjar ferðir, so her er einki við at ganga og skulka.
Vit eru býtt upp í flokkar á umleið 25 næmingar. Vit vera verandi í hesum somu flokkunum øll seks árini. Í teimum stóru fakunum verða flokkarnir aftur býttir upp í fýra bólkar, soleiðis at vit eru seks næmingar til hvønn lærara.
Tað er ikki soleiðis, at vit eru á skúlanum allan dagin. Vit hava higartil bara tveir tímar um vikuna á skúlanum. Tímarnir í teimum flestu fakunum ganga fyri seg á ymiskum deildum á størsta sjúkrahúsinum her í býnum. Eg gangi enn bara á fyrsta ári, so mítt høvuðsfak er anatomi. Tímarnir í anatomi ganga fyri seg í smáum líkrúmum, so vit hava altíð lík og kropspartar liggjandi á líkborðum, tá vit hava tíma. Hetta, haldi eg, ger at tað er nógv skjótari at læra alt um hvønn kropspart, og út frá hesum sært tú eisini, at tað er ikki alt akkurát, sum tað stendur í bókunum.
Av tí at tað bert eru seks næmingar til hvønn lærara í høvuðsfakunum, so er tað ógjørligt at koma ófyrireikaður til tíma og sleppa lætt. Tað verða settir spurningar alla tíðina, og um tú ikki klárar at svara, so verður tú ikki væl viðfarin. Lærararnir kunnu gerðast ógvuliga persónligir viðhvørt, men sum alt annað her, so haldi eg, at tað bara er fyri at venja okkum við mótstøðu.
Tað eru við jøvnum millumbilum royndir í hvørjum faki sum skulu klárast. Hetta ger, at tú ongan møguleika hevur at koma langt afturúr í nøkrum, so tað er bara gott.
Hendan gamaldags skipanin var eitt sindur ræðandi í byrjanini, men tað vandu vit okkum ógvuliga skjótt við. Eg haldi, at hetta er ein perfekt skipan fyri meg, tí eg havi ongantíð verið serliga disiplineraður.
Tað er tó ikki soleiðis, at tú mást sita og lesa alla tíðina - tí betur. Tá vit hava eina fríløtu, so er nógv gott, sum vit kunnu finna uppá her í býnum.

*Fyrimunir og vansar av at lesa har tú ert?*
Fyrst og fremst vil eg siga at tað er ein stórur fyrimunur við tí enska programminum. Tá vit eru liðug at lesa kunnu vit arbeiða allastaðni í verðini uttan í USA. Fyri at kunna tað skulu vit taka eina próvtøku afturat. Tann gamaldags skipanin er fyri meg ein stórur fyrimunur. Eisini er tað ógvuliga bíligt at liva her, so tú noyðist ikki at ganga og spara alla tíðina.
Málið er ofta ein vansi. Tey flestu polsku duga mestsum einki enskt, so tað kann vera ringt at samskifta við hvørt. Men polskt er eitt kravt fak her, so vit fáa brongla okkum nøkulunda fram á polskum.
Umframt málinum eru tað bara smáir vansar við at vera her, sum tildømis, at tú ikki mást drekka kranavatnið og at mjólkin smakkar illa.

»Vit hava altíð lík og kropspartar liggjandi á líkborðum, tá vit hava tíma«